QUALITY
INNOVATION
RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir alilaks og liðugvørur úr aksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðs vøran er laksaportiónir til retailmarknaðin í ES. Tað starvast umleið 160 fólk í samtakinum.

**Virkisleiðari**

Vit søkja eftir virkisleiðara til virkini í Klaksvík og á Glyvrum. Arbeitt verður við ávikavist kryvjing og víðarivirking av laksi.

Virkisleiðarin hevur ábyrgd av:

- Tilrættaleggjan av framleiðslu,
- At framleitt verður sambært vørulýsingum,
- Innkeypi av vørum til framleiðsluna,
- At skipa viðlíkahald av virkjum,
- Starvsfólkum á framleiðsludeildini
- Annað í hesum sambandi eftir nærri avtalu

**Førleikakrøv:**

- Hóskandi hægri útbúgving, t.d. innan matvøruverkfrøði, framleiðslu tøkni og fíggjarstýring
- Fyrikomandi, góð samastarvsog samskiftisevni

**Ynskiligt, tó ikki treyt, er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**

- Kunnleika til og royndir frá líknandi framleiðslu

Starvsstaður: á Glyvrum.

**Umsóknarfreist: 30/11**

**Maskinmeistari**

Vit søkja eftir maskinmeistara til virkið á Glyvrum. Framleiðslan er úr laksi, og vørurnar eru serliga frystar vakumpakkaðar portiónir og hjávørur í hesum sambandi. Framleiðsluútgerðin er serliga útgerð ísamband við flakaskering, pakking og innfrysting.

Maskinmeistarin hevur ábyrgd av:

- At tekniska útgerðin virkar eftir ætlan,
- Viðlíkahaldi av útgerðini,
- Annað í hesum sambandi eftir nærri avtalu

**Førleikakrøv:**

Maskinmeistaraútbúgving

**Ynskiligt, tó ikki treyt, er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**

- Kunnleika til og royndir frá líknandi framleiðslu

Starvsstaður: á Glyvrum.

**Umsóknarfreist: 20/11**

Um fyrispurningar eru viðvíkjandi størvunum, so kunna tygum tosa við Regin Jacobsen, stjóra. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknir skulu sendast til:
**Faroe Salmon Processing, Bakkavegur 8,**
**FO-625 Glyvrar, ella bakkafrost@bakkafrost.com,**
**Telefon : 40 50 00, Fax 40 50 09**

---

FRÚUTRØÐ 4
POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35
FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.





# BYGGIØKI TIL SØLU

Eitt byggiøki millum Horna í Tórshavn verður við hesum lýst til sølu. Talan er um hesar ognir:

- Matr. nr. 1121 a: 5.796 m² - óbygt
- Matr. nr. 1121 k: 1.427 m² - við ástandandi sethúsum
- Matr. nr. 1121 i: 512 m² - óbygt
- Matr. nr. 1121 h: 564 m² - óbygt
- Matr. nr. 1121 g: 624 m² - óbygt
- Matr. nr. 1121 l: 1.086 m² - vegur

Ovari parturin av lendinum liggur í A2-umráðisparti í 3. grundumráði og restin í A1-umráðisparti sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Lendið er partvíst liðugt útsprongt sambært tí byggiætlan, sum eigarin hevur til íbúðarbygging. Avlopstilfarið er tøkt.

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, t-post ojk@jura.fo ella skrivaran Elina Svínoy, t-post els@jura.fo fyri at fáa nærri upplýsingar

---



# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Nýggja roknskaparlógin

**Endamál**
Nýggj ársroknskaparlóg er samtykt og kemur í gildi 1. januar 2008 og er galdandi fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2008 ella seinni. Fyri flestu feløg kemur nýggja ársroknskaparlógin at krevja, at størri ella smærri broytingar verða gjørdar í ársroknskapinum.

Endamálið við skeiðnum er at geva luttakarunum innlit í høvuðsmunirnar millum gomlu og nýggju ársroknskaparlógina.

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað fólki, sum í tí dagliga arbeiða við roknskaparspurningum, t.d. roknskaparfólki og grannskoðarum.

**Undirvísingarháttur**
Skeiðið verður skipað sum fyrilestur, kjak og smærri uppgávuarbeiði.

**Pláss er fyri 16 fólkum**

| | |
|---|---|
| **Tíð:** | 5. desember 2007, kl. 09.00-16.00 |
| **Stað:** | Skúlaheimið, Marknagilsvegur 75, Tórshavn |
| **Skeiðleiðari:** | Finnbjørn Zachariassen, Statsaut. revisor |
| **Kostnaður:** | 2.600,00 kr. íroknað tilfar og mat |
| **Tilmelding:** | Áðrenn 28. november ella so leingi pláss er |

Lesið meira um skeið á **www.skeidsdepilin.fo**, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni ella ringið 318813.

TEAM85

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

---

# Frá Sirri og Royndarstøðini



## Móttøka av seyðaskinnum

**Verður á Royndarstøðini í Kollafirði**

| | |
|---|---|
| Miðvikudagin 14. nov. | kl. 10.00-18.00 |
| Hósdagin 15. nov. | kl. 13.00-18.00 |
| Fríggjadagin 16. nov. | kl. 10.00-21.00 |
| Leygardagin 17. nov. | kl. 10.00-18.00 |

**Á Drelnesi, Suðuroy**

| | |
|---|---|
| Mánadagin 19. nov. | kl. 13.00-20.00 |
| Týsdagin 20. nov. | kl. 13.00-20.00 |

Sp/f Sirri

tlf. 224006